

- Vit skulu finna orsøkina til vanlukkuna í gjár, sigur norski samferðslumálaráðharrin

# Neyðugt at finna orsøkina

**-Vit skulu finna orsøkina til vanlukkuna í gjár, sigur norski samferðslumálaráðharrin.**

FLOGVANLUKKA
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

-Vit fara at gera alt, sum gerast kann, fyri at finna orsøkina til vanlukkuna, sigur Liv Signe Navarsete, samferðslumálaráðharri. Tað er neyðugt til tess at tryggja, at slíkar vanlukkur ikki henda í framtíðini, sigur hon.

- Okkara tankar og samhugur leita til teirra, sum hava mist síni kæru, til teirra, sum hava fingið skaða, og til øll tey avvarandi, sigur hon við NTB.

Ætlanin var, at Liv Signe Navarsete skuldi lata ein nýggjan veg uttan fyri Oslo upp í gjár, men tá tíðindini um flogvanlukkuna á Stord bórust gjáramorgunin, valdi hon at geva avboð.

# Helst brek við bremsunum

**Tað var annaðhvørt eitt tekniskt brek ella eitt menniskjaligt mistak, sum gjørdi, at føroska flogfarið fór út av breytini á Stord**

FLOGVANLUKKA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tað heldur í hvussu er Kjell Klevan í norska Loftferðslueftirlitinum. Hann sigur, at lendingarbreytin á Stord er 1.200 metrar long. Eitt flogfar sum tað, ið fór útav í gjár, skal hava minst 1.106 metrar til taks, um tað hevur fulla last, men tí nýtist bara 720 metrar til at lenda á. Men í hesum førinum vóru bara nøkur fá ferðafólk við, og tí nýttist flogfarinum ikki ikki fulla longd til at lenda, sigur Kjell Klevan við Bergens Tidende.

Tí heldur hann ikki, at vanlukkan hevði nakað samband við umstøðurnar á sjálvum flogvøllinum. Eftir hansara eru tríggjar frágreiðingar til vanlukkuna:

- Flogfarið hevði ov nógva ferð, tá tað kom inni yvir vøllin ella kom ov langt inn á vøllin, áðrenn tað setti seg.
- Okkurt annað menniskjaligt mistak.
- Brek við bremsunum ella okkurt annað tekniskt brek.

Tað er kortini ikki líkt til, at flogfarið kom ov langt inn yvir breytina, áðrenn tað kom niðurat, tí maðurin, sum sat í eftirlitstorninum gjáramorgunin, segði við Bergens Tidende í gjár, at flogfarið kom ikki longri inn yvir vøllin enn vanligt, tá tað setti seg.

### Helst bremsurnar

Lars-Erik Strandberg, flogskipari og støðleiðari hjá Atlantsflogi, eygleiddi vanlukkuflogfarið, tá tað setti seg á Stord í gjár. Hann hevur greitt frá, at eftir hansara tykki var einki óvanligt við lendingini. Spurdur, hví flogfarið fór útav, sigur hann við Aftenposten, at bremsurnar kunnu hava svikið, sjálvt um alt var í lagi, tá flogfarið bleiv kannað fyri stuttum.